# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Flogvallarviðurskifti

Tann 1.mai var stórur og søguligur dagur í føroyskari loftferðslusøgu. Tá kundu ein fegin ferðslumálaráðharri og ein nøgdur løgmaður taka ímóti Vága Floghavn, sum higartil hevur verið ogn hjá danska statinum. Vit fegnast øll um hesa yvirtøku, tó at tað eru ymsar meiningar um, hvussu skilabest er at halda fram við framtíðar útbyggingini og menningini av loftvegis flutninginum her á landi.

Sama dag sum flogvøllurin varð yvirtikin hoyrdu vit torurødd frá einum av okkara oddafólkum innan ferðavinnuna, nevniliga stjóranum á Hotel Føroyum og Hotel Tórshavn. Johannes Jensen, sum verður mettur sum ein drívmegi og eldsál í føroyska ferðamannaheiminum, brúkti dagin til enn einaferð at markera sína meining um framtíðar føroysk flogviðurskifti.

Hansara avgjørda meining er einføld og krystallklár: byggið ein alternativan flogvøll í stundini. Bara ein nýggjur flogvøllur kann skapa teir karmar, sum føroyskt vinnulív og her ikki minst ferðavinnan hevur brúk fyri, skal nakar hugsingar verða um menning í framtíðini.

Hóast vit øll fegnast um, at tað nú kemur gongd á útbygging av flogvøllinum í Vágum við bæði longjan og nútímansgerð av tænastufacilitetum, sum eru bráðneyðug, so eigur málið um alternativan flogvøll ikki at feiðast undir teppið av teirri orsøk. Hetta er ikki ein spurningur um antin ella men ein spurningur um bæði og.

Eftir okkara tykki hava vit brúk fyri at longja flogvøllin í Vágum, og bæði kundar og starvsfólk hava rætt til og krav uppá at fáa betri viðurskifti á flogvøllinum. So vit kunnu bara fegnast um, at her nú loksins hendir nakað. Samtíðis mugu vit til at taka orðini hjá eitt nú hotellstjóranum og øðrum vinnulívsfólki í størsta álvara. Kravið til framtíðar loftferðsluviðurskiftini eru bæði ein nútímansgerð av verandi vølli og tilrættalegging av einum nýggjum flogvølli. At okkara politikarar raðfesta undirsjóvartunlar høgt er skiljandi, tí sum oyggjasamfelag er tørvur á einum undirstøðukervi, sum bindur ymsu partarnar av landinum tættari saman. Men tættari og betri samband við umheimin er ikki minni týdningarmikið. Tað er lívsneyðugt. Tað er ein fortreyt fyri, at vinnulívið kann mennast og gerast meira fjølbroytt. So vit vóna, at myndugleikar og politikarar taka til sín úttalilsini frá vinnulívsfólki um ein alternativan flogvøll og av álvara seta hann inn í framtíðar lands- og millumlanda planleggingina.

**Sosialurin**

## Aftursvar til grein hjá Richard Schwartson í Sosialinum 27. apríl 2007

DÁNJAL PETUR HØJGAARD

Tað vardi meg ikki, at mínar fáu reglur í Sosialinum 18. apríl, skuldu fáa eitt tílíkt langt og umfatandi aftursvar frá Richardi Schwartson (RS). Meginparturin er so niðrandi og persónliga áleypandi, at tað sjálvsagt onga viðmerking fær – og má standa sum tað stendur.

RS hongur seg nógv í gásareygu og einstøk orð, men tíverri ógvuliga lítið í sjálvt innihaldið í mínari grein. Ja, veipar enntá við orðabók á lofti so harðliga, at spurningurin er, um eg skal tora at nýta gásareygu meir! Ikki sørt snildisliga sett saman. Pyntað við alskyns sitatum á enskum og týskum. Økir ikki um trúvirðið í mínum eygum heldur enn annara. Lat meg tó líka skoyta uppí, at eg skilji ríkiliga væl týskt, enskt og eisini onnur mál, um tað skuldi verið. Eitt brot skal ikki standa ósvarað. Tað er hetta - og nú má eg heldur sitera bókstav fyri bókstav, orð fyri orð....(sitat, 3. brot, 11. síðsta regla og niður): *Mær hevði list at vita, hvussu DP greinar virkanina av atypiskum antipsykotika á D2-reseptorarnar í suppuni, ella hvussu MMP inhibitorar tálma krabbavøkstri í somu suppu. Eg loyvi mær kortini at ivast í, um DP er førur fyri tí, og krevji tað heldur ikki av honum, tí hetta liggur uttan fyri hansara fakøki* (sitat enda).

Tann tíðin er farin, at RS megnar at imponera meg ella fjøldir av vælútbúnum ungum studentaskúlanæmingum á t.d lívfrøði hástig ella lívfrøði-lesandi. Tey (og eg) klára væl at gjøgnumskoða tað, ið RS so flott sleingir út við. Bæði inhibitorar og reseptorar eru við í standardpensum á studentaskúlastigi. Hendan útsøgnin hjá RS bendir sostatt á, at hann ikki veit, hvat ið fer fram á útbúgingarøkinum í dag. Tað fer tí at gerast alt meira trupult hjá RS at villeiða almenningin um ymisk faklig viðurskifti á náttúruvísindaliga økinum. Tað gerast støðugt fleiri, ið lættliga eru før fyri at avdúka slíkar retoriskar krúllur ella aðrar rættiliga einvísar pástandir, ið hann kemur við. RS endar greinina við at koma inn á, at vísindin skal leita eftir sannleikanum. Púra samdur. Má tó viðganga, at tað eg higartil havi sæð RS skrivað í føroyskum bløðum sýnir, at hann fer sera lætt um vísindaliga sannleikan í tí, hann viðger.

Tað er mikið gott at seta upp strangar reglur fyri onnur at halda í skrift og talu; men so er sjálvur at halda tær. RS brýtir flestu av hesum reglum: leggja orð í munnin, seta upp strámann, akademikari má orða seg varisliga, tvíspora inn í annað fakøki, osfr. Tosaði nakar um sjálvmál? Hugsi, at her ruku fleiri inn av slagnum. Kundi eisini verið skírt boomerang-kast! At krevja fullan neutralitet av mær í øllum í einum stuttum lesarabrævi, samstundis sum RS vil sleppa at at kunngera sínar subjektivu metingar, hongur ikki heilt saman. Hetta er tað, ið á vanligum føroyskum máli verður nevnt at "blása og hava mjøl í munninum í senn" (orsaka gásareygu). Her ruggar ikki heilt rætt at krevja neutralitet – betri var her at sagt objektivitet – av øðrum, meðan einum sjálvum skal vera loyvt í tíð og ótíð at koma við subjektivum álopum á ymsar náttúruvísindaligar áskoðanir. Kanska tað mest álvarsliga í skrivingarlagnum hjá RS og fyri tann skuld eisini Símun Absalonsen, SA, er at teir sjálvir eru fleiri bátslongdir framman fyri áganginhjá kristnum fólki á øðrvísi hugsandi í avgomlum døgum, ið teir kappast at fortelja fólki um. Serliga við atliti til at leggja eftir nútíðar náttúruvísindi og -vísindafólki.

At leita eftir sannleikanum er eitt ediligt mál í sjálvum sær; men – sum skrivað stendur - "Hvat er sannleiki?" Efti mínum tykki eru tað fá ella ongi kirkjufólk í Føroyum, ið taka undir við sannleikavirðinum í niðurstøðuni hjá RS og SA, har báðir sýnast halda uppá, at kirkjan lítið og onki hevur við kristindóm at gera.




## Spurningur til Kringvarp Føroya

UNN HENTZE

Eg sá ikki Dag og viku í gjár, 1. mai, men ein vinkona fíltist á, at tey einki brot høvdu úr røðuni hjá Jenis av Rana, tá tey høvdu brot úr báðum hinum røðunum.

Tí vil eg spyrja, hví Kringvarpið í Degi og viku, í gjár 1. mai, einki brot hevði av røðuni hjá Jenis av Rana?

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Eyðhild Jacobsen eydhild@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.